# Púrasta syndarligt

**John Johannesen sigur, at málið um Sladjanu Petrovic líkist einum fullkomnum broti á eina greiða politiska semju**

ÚTLENDINGAMÁL
*Jákup Mørk*

Ein av samgongutingmonnunum, sum fleiri ferðir hevur havt at handfaringini av útlendingamálinum, er John Johannesen úr Javnaðarflokkinum.

Hann var ikki sørt skelkaður, eftir at hann í Degi og Viku kundi staðfesta syrgiligu lagnuna hjá hjúnunum Raiko og Sladjana Petrovic.

### Politiskt avtalubrot

Hóast hann ikki vil leggja seg út í viðgerðina av einstøkum málum, so heldur John Johannesen, at talan er um eitt klokkuklárt brot á politiskar avtalur, nú Sladjanu varð noktað eina leingjan av uppihaldsloyvinum.

- Tá alt rumblið um útlendingamálið tók seg upp, varð ein púrasta greið politiskt semja gjørd. Útlendingar, sum longu vóru í Føroyum, skuldu ikki verða raktir av eini uppstramman í reglunum. Hetta hevur eisini fleiri ferðir verið uppi at venda, tá nú fyrrverandi innlendismálaráðharrin hevði hug at gloyma semjuna, og boðini hava alla tíðina verið klokkuklár í so máta.

- Men at síggja til, so er hetta bara enn eitt dømi um, hvussu syndarlig handfaringin av hesum málinum hevur verið. Talan er um eitt mál, sum er syrgiligt allan vegin ígjøgnum. Meira fái eg ikki sagt um hetta.

### Ræðist avleiðingarnar

Men er nakað, ið tú sum tingmaður kann gera við hetta aktuella málið?

- Sum so ikki. Tað er jú ikki okkara uppgáva at leggja okkum út í einstøk mál. Vit kunnu bara vóna, at nýggi landsstýrismaðurin megnar at fáa skil á økið. Í kraft av síni útbúgving, eigur hann í øllum førum at hava nakrar eginleikar, sum brynja hann til hetta, heldur John Johannesen, sum annars sigur, at talan er um mál við mest sum ræðandi avleiðingum.

- Tað hevur jú verið tosað um, at vit skulu yvirtaka málsøkið, so full greiða kann fáast á hesum. Persónliga havi eg eisini verið fyri hesum, men eg má snøgt sagt sigast, at eg eri farin at ivast. Skal okkara egna handfaring av hesum vera somikið klossut, so ræðist eg snøgt sagt avleiðingarnar, staðfestir javnaðartingmaðurin.



*John Johannesen sigur seg nú ivast, hvørt tað er rætt at yvirtaka útlendingamálið. Hann sigur seg bart út ræðast avleiðingarnar, um hetta skal verða framferðarhátturin*

# Høgni var skelkaður

**Høgni Hoydal hevði valla orð fyri tí, sum hann sá í Degi og Viku. Men hann helt, at hetta var ein syrgilig undirstrikan av tí, sum hann fleiri ferðir hevur nevnt um útlendingamálið**

ÚTLENDINGAMÁL
*Jákup Mørk*

Tá vit fingu orðið á Høgna Hoydal týskvøldið, var hann bart sagt skelkaður av tíðindunum, sum høvdu verið í Degi og Viku.

- Snøgt sagt, so veit eg ikki rættiliga, hvat eg skal svara. Eg kann sum so bara endurtaka tað, sum eg havi sagt so oftani. At alt útlendingamálið er vorðið eitt stórt kaos. Tað er ikki bara Jógvan við Keldu, sum hevur ábyrgdina av hesum. Tað er øll samgongan, sum hevur latið málið fara soleiðis av kós.

- So seint sum í farnu viku hevði eg ein fyrispurning til løgmann um hetta. Tá var svarið, at rættartrygdin hjá útlendingum í Føroyum er í lagi. Og har varð eisini staðfest, at útlendingar, sum vóru í landinum, áðrenn alt hetta byrjaði, ikki skuldu verða rakt av hesum. Tað sum vit so síggja í kvøld er eitt syrgiligt dømi um, at einki hald var í svarinum, sum eg fekk frá løgmanni.



*Høgni Hoydal varð skelkaður, tá hann sag Dag og Viku týskvøldið. Fyrst og fremst, so ætlar hann sær at kanna, hvat veruliga er hent í hesum málinum*

### Loysnin var har

Sum fyrrverandi landsstýrismaður í útlendingamálum og sum fólkatingsmaður er Høgni Hoydal ein av teimum politikkarunum í landinum, sum hevur havt mest við útlendingamálið at gera.

Og hann dylir ikki yvir, at hann heldur, at allur útlendingaspurningurin kundi verið væl betri avgreiddur.

- Eg havi sagt tað so ofta eftirhondini. Vit høvdu eina loysn, sum var klár at undirskriva, tá nýval varð útskrivað. Eina loysn, sum vildi viðført betri rættartrygd og styttri avgreiðslutíð. Og sum enntá hevði eina serskipan fyri ítróttarfólk.

- Ein trupulleiki í øllum hesum er tó, at vit ikki hava yvirtikið málsøkið. Sjálvandi hava danir alla tíðina eftirlíka føroysku við- ella frámælunum. Men ábyrgdarbýtið í hesum er ógreitt. Og tað sæst eisini aftur, tá fyrispurningar verða settir. Sjálvur havi eg sett fleiri av slagnum í bæði løg- og fólkatinginum, men bólturin verður hvørja ferð kastaður víðari. Málini eru ikki einføld at greiða, og tá eitt føroyskt og eitt danskt ministerium skulu umsita tað - enntá við íblanding frá einum triða parti, sum er løgregluni - so verður talan um ógreiðar mannagongdir.

### Ætlar at brúka fólkatingssessin

Nú hann eisini hevur sæti á fólkatingið, hevur Høgni Hoydal kanska betri møguleikar at gera sína ávirkan galdandi, enn flestu tingmenn hava. Og hóast hann neyvan kann broyta støðutakanina í hesum málinum, so ætlar hann sær at kanna hetta til botns.

- Tað eigur sjálvandi ikki at vera so, at ein parlamentarikari leggur seg í viðgerðina av einstøkum málum. Men tað havi eg fleiri ferðir gjørt í útlendingamálum. Snøgt sagt fyri at hjálpa hesum fólkunum. Og eg ætli mær eisini at spyrja eftir hesum málinum í danska Útlendingastýrinum, sigur Høgni Hoydal at enda.

## B-brøvini hvørva

**Sum liður í umskipanini av Postverkinum verður talan um hækkan av postgjøldum. Útbering av lýsingum verður tó bíligari**

POSTVERKIÐ
*Jákup Mørk*

Allur B-postur hvørvur, og í framtíðini verður talan bara um A-post. Tað fer at merkja hækkandi útreiðslur hja teimum virkjum, sum hava gjørt nýtslu av B-brøvum. Tað ljóðar tó, at Postverkið í framtíðini kann gera seravtalur við størri virki um postflutning.

Innlendis pakkagjøldini hjá Postverkinum hækka við umleið 5%, umframt at meirvirðisgjald nú skal leggjast á hesar sendingar.

Kostnaðurin fyri útberingav tíðindabløðum hækkar við 30%, meðan útberingin av lýsingarbløðum hinvegin lækkar við 6%. Meirvirðisgjald verður tó lagt omaná hetta seinna, men er talan um mvg-skrásettar fyritøkur, so tyngir hetta ikki rakst-urin kortini.

Hartil verður talan um nakað hægri kostnaðir fyri pengaflutningstænastur og fyri pakkapostgjøld til Danmark, Grønlands og Ísland.

Sum skilst, so er málið hesum viðvíkjandi tó ikki endaliga avgreitt. Nevndin í nýggja partafelagnum hevur nevnliga ikki tikið støðu til ætlaðu broytingarnar, skilst.

## Tobba-málið avgreitt

Torbjørn Jacobsen hevur rindað 22.000 kr. í bót og hevur mist koyrikortið í tvey ár

Hesum hevur tingmaðurin boðað frá í skrivi, sum er sent føroysku miðlunum.

Torbjørn Jacobsen hevur gjørt uttanrættarligu semju í málinum, og hevur hann her góðtikið sektaruppskotið hjá fútanum.

Í uppskotinum mælti fútaembætið til, at Torbjørn misti førarara̧ttin í tíðarskeiðnum frá 1. sept. 2005 til 31. august 2007. Hartil skal tingmaðurin rinda bót á 22.000 kr.

Torbjørn Jacobsen sigur at enda. málið harmar seg almikið, og at hann tekur hvassliga frástøðu frá gerðini, sum elvdi til hetta.

**-mørk**